# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroysk filmslist stóran týdning

Vit liva í eini tíð, har ávirkan uttanífrá er stór. Roynt verður tí at hjúkla um tað, sum føroyskt er, men vit røkka ov stutt. Ein listagrein, sum tíverri ikki hevur verið raðfest høgt er filmur. Tað er løgið, tá hugsað verður um, hvussu stóra ávirkan og týdning filmur á móðurmáli og úr egnum umhvørvi hevur fyri mál og mentan, samleika og samfelag.

Vit mugu broyta hugburð til filmslistina. Gera hana til part av okkara skapandi gerandisdegi. Filmur er so spennandi og gevandi miðil, at tað er ein sjálvfylgja, at tað almenna og vinnan eru við til at lyfta.

Vit hava eisini søguligar traditiónir at vísa á. Nakrar av fyrstu upptøkum, sum heimsins elsta filmsfelag Nordisk Film hevur gjørt, eru úr Føroyum. Vit hava verið ein magnet á hesum øki. Fyrst og fremst tí, at vit eiga dramatisku náttúruna, men eisini tí at vit eiga søgur og sagnir undir hvørjum steini. Gjøgnum alla farnu øld hava bæði heimildar- og spælifilmar verið tiknir í Føroyum. Men sjálvi hava vit ikki tikið ábyrgd á hesum øki. Í áratíggju fingu føroyskir skúlar atgongd til Statens Filmcentral og teirra tænastur, so okkara skúlanæmingar kundu njóta gott av hesum miðili, ið sum eingin annar kundi siga frá vandanum við tubbakki, eykvæmi og øðrum vandamálum, ið krevja skjóta og effektiva útbreiðslu. Men samstundis sum tjóðskaparrørslan tók dik á seg, vildu vit standa á egnum beinum. Eins sjálvsagt og positivt, sum tað er, eins satt er tað, at vit samstundis frásiga okkum útlendskar fíggjarmøguleikar at gera film. Sama er galdandi á øðrum listarligum økjum. Tí er tað ein tung ábyrgd hjá politikarunum at skipa so fyri, at okkara listafólk fáa eins góða atgongd til stuðul og yrkisliga menning av verkætlanum sum samstarvsfelagar í útlondum vit samstarva við.

Tað er ein sannroynd, at fleiri av uppvaksandi ættarliðnum heldur velja visuellan miðil sum film enn góðu gomlu bøkurnar. Hetta er ein stór politisk, fyrisitingarlig og námsfrøðilig avbjóðin. Spíranir sóust longu við Agurk-kappingunum og framhaldandi við filmsverkstaðnum Klippfisk, sum Tórshavnar kommuna stuðlar. Ganga vit saman, kann hesin tilhaldsstaður gerast eitt vakstrarhús av teim heilt sjáldsamu.  Hóast ongan føroyskan filmspolitikk ella serstaka filmsjáttan, hittast ungfólk í Klippfisk, sum hava gjørt seg galdandi í grannalondunum. Men uttan netverk ber ikki til. Tað prógvaði filmurin hjá Katrini Ottarsdóttir um Jóanes Nielsen. Starvsløn er eitt gott støði, men meiri skal til. Filmur er tann listagrein, ið er mest knýtt at einum virkandi undirstøðukervi, heilt frá høvundum, umvegis mynda- og ljóðfólk, til tøkniliga líðuggerð og marknaðarføring.

Í Írlandi er almenna listarliga stuðulsskipanin soleiðis, at starvsløn er skattafrí. Tí kemur írskur listarligur stuðul so væl til sættis. Stuðulin vit  lata listafólki sum starvsløn er vunnin gjøgnum tógvið stríð. Flestu listarfólk hava ikki aðra løn at dúva uppá. Tí man tað í dag tykjast mongum listarfólkum høpisleyst at bera helvtina av hartvunnu krónunum aftur í landskassan. Skal lív vera filmslistini lagað, má nýhugsan og víðsýni til.

**Sosialurin**

## Skamma teg, Dimmalætting!



**HANS PAULI STRØM**
framsøgumaður fyri Javnaðarflokkin um Heilsutrygd

Dimmalætting skrivar í blaðnum, sum kom í kvøld, tórskvøldið, ógviliga speirekandi um tingviðgerðina av lógaruppskotinum um nýggju sjúkratryggingarskipanina, Heilsutrygd, ið skal koma í staðin fyri avoldaðu sjúkrakassarnar.

Hevði tað bara verið ein einkult grein, sum ein av blaðmonnunum hevði skrivað, hevði man kanska fyrigivið – tað kunnu vera so nógvar ymiskar orsøkir til at ein persónur kann blíva í ørviti, og tað kann sjálvandi eisini henda fyri ein journalist.

Men nú hevur Dimma ikki minni enn 3 greinar um tingviðgerðina, allar við júst sama ørvitisliga innihaldi. Ta einu greinina skrivar Sveinur Tróndarson, ta næstu skrivar Jógvan Jákup Jákupsson, og tann triðja er oddagreinin, sum eg gangi út frá at annar av blaðstjórunum skrivar. Kann ikki trúgva at tey øll trý eru í ørviti.

Kortini er veruleikin tann, at tað er onki fantilsi í tí, sum stendur um tingviðgerðina í øllum hesum trimum greinum.

Dimmalætting øsir seg upp og skeldar løgtingið út fyri, at tingviðgerðin als ikki snúði seg um innihaldið í lógaruppskotinum um nýggju sjúkratryggingarskipanina, men bert um, hvar skrivstovan við teim 8 fólkunum skuldi liggja.

Hetta er jú kolasvørt lygn! Tað vóru 6 framsøgufólk fyri allar flokkarnar á løgtingi. Tórbjørn Jacobsen, Jaspur Vang, Jákup Mikkelsen, Hans Pauli Strøm, Bill Justinussen og Kári P. Højgaard. Eftir teir helt so landsstýrismaðurin síni samanfatandi røðu um málið.

Øll hesi framsøgufólk fyri flokkarnar umrøddu lógaruppskotið innihaldsliga. Um trupulleikarnar við gomlu skipanini. Um tær nógvu góðu positivu broytingarnar, sum fóru at koma við hesi nýggju skipanini, um heilsutænastunar, sum skuldu veitast við nýggju skipanini, hvussu borgarin fór at verða nógv betri stillaður á øllum økjum, hvussu nógv meira rationell og samhaldsføst, tann nýggja skipanin fór at verða – og ikki minst um tær veldigu broytingarnar í tilskotsskipanini til heilivág, sum fóru at vera til stóran fyrimuns fyri tey børn og ung, fyri pensjonistar og varandi sjúk – tvs. júst teir bólkaranr, sum hava størstan tørvin á heilivági.

Sjálvur helt eg tað vera framúrskarandi fyri eina tingviðgerð av einum politiskum stórmáli, hvussu væl og sakliga ØLL framsøgufólkini hildu seg til sjálvt málið, til kjarnuna í málinum, og til tey positivu perspektivini í málinum um nýggju skipanina við Heilsutrygd – og hvussu einmælt positiv øll framsøgufólkini vóru fyri at fremja málið. Framsøgufólkini fingu eisini nógvar viðmerkingar frá øðrum tingfólkum. Alt var eitt tjak um innihaldið í nýggju skipanini – kanska onkur onkur brúkti nøkur sekund upp á onkra viðmerking um plaseringina av stovninum.

Tað er sjáldan, at eg havi upplivað so positiva viðgerð av einum politiskum stórmáli.

Men so einaferð, tá øll framsøgufólk eru liðug við sínar røður, kemur ein einsamallur maður av Dimmalætting og setir seg á áhoyrarabonkin. Hann hevur onki tól við. Onki pappír heldur at skriva á. Hann situr við eini fartelefon og trýstir á knappar.

Tá eru vit í allarsíðsta endanum av tingviðgerðini, har einir 3-4 tingmenn taka málið upp um staðsetingina av nýggja stovninum, Heilsutrygd. Og sjálvsagt koma eisini tá nakrar markantar meiningar fram um tað.

Men hetta var ein smálutur í tingviðgerðini - tann allar minsti parturin í sjálvum endanum á tingviðgerðini – tað var tá ið Dimma varð vaknað og blaðmaðurin kom og settist við síni fartelefon á áhoyraraplássinum.

Haldi tað vera ótrúliga óseriøst og ósakligt – undir alt lágmark fyri journalistiskari viðgerð, sum Dimmalætting borðreiðir við. Tit áttu at skamma tykkum! At ein einstakur blaðmaður sum sagt kann taka feil er at fyrigeva. Men at blaðið skrivar tríggjar greinar við ongum skili í um hetta evnið, tað er langt úti.

Um blaðstjórnin á Dimmalætting – ella lesararnar – vilja hava prógv fyri tí, ið eg her havi skrivað, og sjálvir vissa seg um hvat fyrigekk í tinginum, so ber til her á heimasíðu løgtingsins at hoyra hvørt orð, ið varð sagt:
**www.logting.fo/files/sound/2009/72/1/2009-72-1.html" http://www.logting.fo/files/sound/2009/72/1/2009-72-1.html**

Við respekt fyri journalistikkum etikki átti blaðstjórin á Dimmalætting at sett seg at lurta – og kanska hugsa umaftur.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax  341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.